## Líta ikki á Løkke

Tveir triðingar av teimum donsku veljarunum vænta ikki, at Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, er førur fyri at tryggja sitandi stjórn afturval á næsta fólkatingsvali. Tað vísir ein nýggj kanning, sum Greens hevur gjørt fyri Børsen. Kanningin vísir eisini, at hevði fólkatingsval verið í dag, høvdu andstøðuflokkarnir fingið 90 fólkatingsumboð, og Helle Thorning-Schmidt hevði tikið við sum stjórnarleiðari. Eisini vísir kanningin, at Sosialdemokratarnir høvdu verið størsti flokkur við 26,2 prosentum av atkvøðunum.



## Dýrt vatn úr Grønlandi

Tey, sum kundu hugsað sær at sløkt tostan við vatni úr einum av ísfjøllunum í Ilulissat-fjørðinum í Grønlandi, fara helst at hugsa seg væl um, áðrenn tey snara tøppinum av vatnfløskuni. Tí vatnið, sum hevur fingið tað enska navnið "Iluliaq  Original Iceberg Water", kostar 500 krónur fyri eina fløsku. Tað er tí greitt, at tað verður ikki tað vanliga fólkið, sum fer at sløkkja tostan við tí grønlendska ísvatninum. Tað vænta seljararnir heldur ikki, og tí verða tað stórhandlar í londum sum Saudiarabia, Sameindu Arabisku Emiratunum og Japan, sum fara at selja teir dýru droparnar, sigur KNR.

# Vit missa alla virðing úteftir

**– Tað eru ikki vit, sum mæla ICES til at seta føroyskari fiskiveiði treytir og skerjingar. Havstovan letur ICES tey data, sum stovnurin kemur til við sínum kanningum. Nógv lond eru limir í ICES, og har sita dugnaligir og høgt mettir fiskifrøðingar og gera sínar niðurstøður við grundarlagi í tí data, sum vit ár um ár útvega okkum á føroyska landgrunninum. Tað er tí skeivt at siga, at tað er Havstovan, sum sigur ICES, hvørjar teirra metingar skulu vera um fiskastovnarnar í føroyskum sjógvi, sigur Hjalti í Jákupsstovu**

RÁÐGEVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Eg havi eisini mínar royndir gjøgnum 40 ár. Áðrenn eg fór at lesa, var eg sjómaður og øll hesi árini, síðan eg kom heimaftur, havi eg arbeitt við fiskiveiði, kanningum og hagtølum. Haldi meg tí hava líka nógv skil fyri fiskiveiði sum Olaf Olsen. Munurin á okkum báðum er, at meðan eg havi sitið á kanningarsíðuni, hevur hann sitið á veiðimanssíðuni, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

> *... tað var eftirmaður mín, Eilif Gaard, sum byraði við gróðurkanningunum, og tað er hann, sum hevur fylgt teimum upp øll árini. Hesar kanningar hava stóran týdning fyri okkara metingar..."*
>
> *Hjalti í Jákupsstovu*

"Fiskifrøðilig ráðgeving rívur grundarlagið undan Føroyum. Tað er bara ein adressa til tess at fáa útlendskar fiskakeyparar at keypa føroyskar fiskavørur, og hon er Havstovan. Tey lurta eftir havgranskingarstovninum ICES, og tað er Havstovan, sum letur ICES síni tilmæli. Adressan at byrgja upp fyri áganginum á okkara fiskavørur uttanlands, er bert hin eina. Hon er Havstovan. Eg eri ógvuliga troyttur av at hoyra, at trýstið á okkara fiskastovnar framhaldandi er ov stórt..."

So avgjørdur er Olaf Olsen, fyrrverandi skipari, reiðari og løgtingsmaður í Sosialinum í gjár.

### Tað siðbundnað

Vit hava spurt Hjalta í Jákupsstovu, fiskifrøðing, sum hevur verið leiðari á Havstovuni gjøgnum mong ár, hvussu hann lesur greinina hjá Olafi Olsen.

– Fyrst er at siga, at eg lesi hesa greinina, sum er hon frá manni, ið var úti og fiskaði fyri 1977, tá fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar. Tá kundi tú fiska hvar sum helst, tú kundi fiska so nógv, tú vildi, og tú kundi gera, sum tú vildi. Orðini eru frá manni, ið ongantíð hevur livað seg inn í broyttu umstøðurnar, sum gjørdu seg galdandi, tá heimaflotin bert hevði okkara egna havøki at liva av. Líkt er ikki til, at Olaf Olsen í nóg stóran mun hevur skilt, at vit bara eiga økið innanfyri 200 fjórðingar. At vit eiga at hava stóra virðing fyri tí lívfrøðiliga, sum er á hesum øki, og at tað er hetta, vit eiga at tjenar pening upp á. Hann roynir at halda fast um tað gamla og siðbundna, men tað ber bara ikki til í dag, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Hann sigur, at tá hann sum 33 ára gamal kom heimaftur úr Danmark, keypti hann sær eitt 8-mannafar, sum hevði eina hondsnellu. Í dag hava flestu bátar ekkolodd, gps'ara og flestu hava fleiri sjálvvirkandi snellur. Sama er við teimum, sum royna við línu og hava sjálvvirkandi skipanir, sum kunnu seta fesk øgn í sjógvin.

### Spurningur um álit

– Nú nýggjur stjóri er settur á Havstovuni, sum er Eilif Gaard, rokni eg við, at hann verður minst líka so dugnaligur sum eg. Eg havi stórt álit á honum, og eg eri fegin um, at valið fall á hann. Avrikssáttmála er orðaður millum nýggja stjóran og Fiskimálaráðið, og í hesum sáttmála liggur eisini, at Havstovan skal hava tættari samstarv við vinnuna. Men tað er greitt, at hetta kann ikki verða upp á slíkar treytir, sum Olaf Olsen í nevndu samrøðu leggur upp til. Havstovan kann ongantíð gerast ein nikkudukka hjá vinnuni, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Leiðarin á Havstovuni gjøgnum mong ár sigur, at tað gongur ikki soleiðis fyri seg, at tað er Havstovan, sum fer til havgranskingarstovnin ICES við nøkrum tilmæli um nakað sum helst.

– Soleiðis er tað heldur ikki vit, sum mæla ICES til at seta føroyskari fiskiveiði treytir og skerjingar av fiskidøgum.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at Havstovan letur ICES tey data, sum stovnurin kemur til við sínum kanningum, eitt nú ingulkanningum, yvirlitstrolingum og gróðurkanningum.

– Nógv lond eru limir í ICES, og har sita dugnaligir og høgt mettir fiskifrøðingar úr nógvum ymiskum londum. Tað er teir, sum gera sínar niðurstøður við grundarlagi í tí data, sum vit ár um ár útvega okkum á føroyska landgrunninum. Tað er tí skeivt at siga, at tað er Havstovan, sum sigur ICES, hvørjar teirra metingar skulu vera um fiskastovnarnar í føroyskum sjógvi, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Hann leggur aftrat, at hevði Havstovan gjørt eftir politiska viljanum í Føroyum – ella eftir tí, sum vinnan leggur upp til – hevði stovnurin verið tillátursgjørdur í ICES og í aðrar mátar millum slíkar ábyrgdarfullar stovnar.

– Sum havgranskingarstovnur og ráðgevandi stovnur eru vit við í hesum samstarvi, og tá so er, noyðist tú eisini ábyrgdarfult at verða við upp á hetta. Annars er eingin meining við tí heila.

Hjalti í Jákupsstovu vísir á, at ein partur av arbeiðnum hjá slíkum ráðgevandi stovnum er at halda vakið eyga við, at fiskastovnar ikki verða niðurfiskaðir.

– Norðhavssildin var burtur í 25 ár, makrelurin í Norðsjónum bleiv burtur, og toskurin á Flemmish Kap hevur verið burtur heilt síðan 1992. Tað er okkara ábyrgd, at fiskiskapurin undir Føroyum verður varandi – og ikki heldur uppat av ovveiði, sigur hann.

### Hava vakið eyga

Vit spurdu eisini Hjalta í Jákupsstovu, um tað er nakað, sum føroyskir myndugleikar kunnu gera, nú virkað hýsa undan Føroyum er fyri stongsli í Bretlandi, tí stórar handilsketur eru komnar eftir, at hýsuveiðan í føroyskum sjógvi ikki er burðardygg.

– Í somu løtu, sum vit seta okkum fyri at gera nakað, tá vit síggja, at stovnurin er illa fyri, loysast eisini slíkir trupulleikar í eitt nú Bretlandi. Men seta vit okkum hendur í favn og bara blaka runubløk ímillum okkum, hendir einki. Vit mugu gera okkum ein veiðisetning í slíkum føri sum ger, at fiskastovnurin ikki verður niðurfiskaður.

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at hóast vit hava eina fiskidagaskipan, sum nógv meta vera hina bestu, kunnu vit ikki seta okkum aftur á og halda, at alt er í fínasta lagi, tá tað gongur niður á bakka við ávísum fiskastovnum. Eingin trýr okkum, tá vit siga, at vit hava eina fiskidagaskipan, sum er sjálvregulerandi, sum so mangan hevur verið tikið til. Allar súður eru ikki syftar fyri tann skuld, tí so væl spælir klaverið heldur ikki, sum hann tekur til.

Hann sigur, at tað er bara ein avgerð sum munar í slíkum føri, og tað er hin politiska avgerðin um, at nú vilja vit gera nakað.

– Um Føroyar bara halda fastum sína fiskidagaskipan, og eingi stig taka, tá tað gongur niður á bakka í ávísum fiskastovnum, fer eingin at trúgva, at vit hava eina burðardygga fiskiveiðiskipan, leggur hann aftrat.

Men er tað so kvotur, sum Havstovan vil hava innaftur heldur enn núverandi skipan, spurdu vit eisini.

– Nei, tað er ikki kvotur, vit vilja hava aftur. Fiskidagaskipanin er góð, men vit skulu bara vita, at hon